# Monkey Mongolia og Speaker til Íslands



*Speaker: Sigurd Justinussen, Jan Joensen, Janus Rasmussen og Bogi Berg*



*Monkey Mongolia: Frans Galán, Bartal Læarson og Eyðun Müller*



*Karl Anton Klein er fyriskipari*

**Á páskum fara tveir havnabólkar, Monkey Mongolia og Speaker, til Íslands at royna seg. Teir vera har eina góða viku, og fara at spæla allastaðni teir sleppa framat**

TÓNLEIKUR
*Jan Rúni Poulsen*
*jan_runi@hotmail.com*

Á páskum fara tveir havnabólkar til Íslands. Talan er um Monkey Mongolia og Speaker. Báðir bólkarnir halda til og venja í Margarinfabrikkini. Karl Anton Klein er høvuðsfyriskipari, men leggur stóran dent á, at bólkarnir eru við í fyrireikingini.

### Speaker

Bólkurin bleiv stovnaður í 2002, og er manningin næstan tann sama í dag. Bert tað, at ein guittarspælari fór burturúr. Nú eru teir fýra ungir mans, ið manna bólkin. Speaker nevna teirra slag av tónleiki, alternativan rock. Bólkurin leggur stóran dent á at skriva egin løg. Gjøgnum hesi góðu tvey árini, bólkurin hevur spælt saman, hava teir spælt til einar tíggju til fimtan konsertir. Hesar vóru næstan allar fyriskipaðar saman við Karl Antoni, ið eisini skipar fyri túrinum til Íslands. Manningin í Speaker gleðir seg óført til at fara til Íslands og fara teir at spæla nakrar konsertir í Føroyum, áðrenn teir fara, fyri líkasum at hita upp. Teir hopa uppá at fáa gott samband við onkran íslendskan bólk ímeðan teir eru har. Og ætlanir eru síðani, at bjóða hesum bólkum til Føroya at spæla. Spurdir um framtíðarætlanir siga teir, at teir fara at herja á aftur,og koyra á víðari, tá ið teir koma aftur til Føroya.

### Monkey Mongolia

Bólkurin var stovnaður í ár 2000. Hetta er ein bólkur, ið ofta hevur skift limir út. Bólkurin lýsir sítt slag av tónleiki sum friðarligan harðan rock. Byrjaðu at venja í kjallarunum hjá hvørjum øðrum, men fingu so einaferð eitt høli í Margarinfabrikkini. Hetta var júst tað, ið skuldi til fyri at reiðiliga at fáa gongd á. Nú venja teir fleiri ferðir um vikuna og spæla ofta til konsertir. Í mai mánaði í síðsta ár vunnu Monkey Mongolia Pop Top kappingina og vunnu sær pláss til Ólavsøkukonsertina av tí sama. Eisini hava teir spælt nógvar konsertir á Margarinfabrikkini, á Vertshúsinum, á jazz-festivalinum og á Meiarínum. Teir fara saman við Speaker at spæla nakrar konsertir áðrenn teir fara til Íslands. Og teir fara somuleiðis bara at koyra á, tá teir koma aftur. Bólkurin hevur í løtuni einki ordiligt navn og manningin er skift út seinastu dagarnar. Tað er so at siga ein nýggjur bólkur skilst. Næsta konsertin í Margarinfabrikkini verður 20. Februar. Ølkl eru vælkomin.

### Íslandstúrurin

„Føroyar er so lítlar, hetta er ein grundin. Her upplivir man tað sama allatíðina. Pluss tað, at hetta er ein mennandi túrur fyri bólkarnar. Hetta er sera gott fyri teir!" sigur Karl Anton.

Høvuðsfyriskiparin aftanfyri hetta megnar tiltakið er sum sagt, Karl Anton Klein. Hann fortaldi okkum, at hann hevur skipað fyri tílíkum tiltøkum fyrr.

Tá ið vit spurdu Karl Anton, hvat ið hann ger á Margarinfabrikkini, svaraði hann okkum, at hann hevur eitt felag ið eitur ART. Áhugafelag Rock Tónleikara. Hetta er eitt felag ið roynir at gera alt hvat ið tað kann fyri at bøta um korini hjá tónleikarum í Havnini. T.v.s. skaffa teimum hølir, skipa fyri konsertum har bólkarnir spæla og sum t.d. nú, ein uttanlandsferð.

Tað er konsert í Margarinfabrikkini annaðhvønn fríggjadag. Her sleppa bólkarnir at royna seg, Og tiltøkini hava higartil fingið góða undirtøku. Høvuðsgrundin, til at Karl Anton valdi at fara uttanlanda við Speaker og Monkey Mongolia er hon, at hann heldur at bólkar hava nøkur spælistøð her í Føroyum, men tá ið ein bólkur hevur spælt líka nógv og leingji sum hesir báðir, er tíð at fara uttanlanda. Tí tá er ikki serliga nógv spælistøð eftir fyri teir her í Føroyum. Hann heldur eisini, at hetta verður ein mennandi túrur fyri bólkarnar.

Eitt annað teir hopa uppá, er at fáa gott samband við Ísland. T.v.s. kanska fáa íslendskar bólkar hendanvegin eisini.

Ferðin verður fíggjað av bæði almennum stovnum, og av privatfólki.

Allir í bólkunum siga, at teir eru virkuliga glaðir fyri at hava Karl Anton har, tí hann er ein so góður stuðul at hava. Hann arbeiðir sum tónleikari fyri tónleikarar.



# Arbeiðarafeløg á Skálafjørðinum leggja saman

**Arbeiðarafeløgini, Klettur og Hæddin, sum bæði umboða arbeiðsmenn og kvinnur í Runavíkar kommunu, hava nú samtykt, at limirnir hjá Kletti gerast limir í arbeiðarafelagnum, Hæddini. Samstundis verður felagið Klettur, sum er nøkur fá ár eldri enn Hæddin, niðurlagt**

ARBEIÐARAFELØG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Flestu arbeiðsplássini í Runavíkar kommunu liggja á Glyvrum, Saltangará og Runavík, og fleiri limir hjá Kletti arbeiða í økinum hjá Hæddini. Nøkur arbeiðspláss eru innari á fjørðinum, men hesi eru ikki so nógv í tali*

Fríggjakvøldið var eykaaðalfundur í arbeiðarafelagnum, Hæddini í Saltangará. Á skránni var samanlegging av arbeiðarafelagnum, Kletti við arbeiðarafelagið, Hæddina.

Í november var fundur í Kletti, har felagið einmælt samtykti at niðurleggja felagið og leggja saman við Hæddini, og á eykaaðalfundinum í Hæddini fríggjakvøldið samtykti felagið einmælt at taka limirnar í Kletti uppí sítt felag.

Klettur hevur limir í innaru bygdunum í Runavíkar kommunu, og Hæddin hevur limirnar av Glyvrum, eystur til Rytuvíkar og suður til Æðuvíkar.

### Størri ábyrgd

Karla Einarsson, formaður í Hæddini, sigur, at lógirnar hjá feløgunum siga í hvørjum feløgum, arbeiðsfólk í ymisku bygdunum eiga at verða limir í.

Hon vísir á, at bæði arbeiðarafeløgini hava sín uppruna í tríatiárunum, men Klettur er nøkur fá ár eldri enn Hæddin.

– Okkara felag hevur stívliga 600 limir, meðan Klettur er eitt minni felag. Samanlagt verður limatalið nú størri, og fleiri limir og arbeiðapláss verða at taka hond um og hava eyguni eftir, nú allir limirnir verða undir einum "hatti".

Karla vísir á, at flestu arbeiðsplássini í kommununi liggja á Glyvrum, Saltangará og Runavík, og fleiri limir hjá Kletti arbeiða í økinum hjá Hæddini.

– Nøkur arbeiðspláss eru innari á fjørðinum, men hesi eru ikki so nógv í tali.

Hon vísir á, at nú feløgini verða løgd saman, verður ábyrgdin mótvegis limunum, sum koma úr Kletti, uppaftur størri.

### Ikki beinanvegin

Tað gongur helst ein tíð, áðrenn feløgini endaliga verða løgd saman, tí nøkur formell viðurskifti skulu avgreiðast fyri ta tíð.

Karla væntar ikki, at samanleggingin verður framd, fyrr enn regluligi aðalfundurin hjá Kletti hevur verið í vár, hóast bæði feløgini nú einmælt hava samtykt samanleggingina.

Arbeiðarafelagið Hæddin hevur egin høli og tvey fólk á skrivstovuni í Saltangará.

Formaður í Kletti er Tummas Jacobsen, og hevur hann saman við skrivara felagsins syrgt fyri skrivstovuhaldinum.

Karla Einarsson er eisini stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag.

# Trupulleikar við arbeiðsgevara eru loystir

**– Tað er friður á arbeiðsmarknaðinum, og arbeiði er til flest allar vinnuførar hendur, sigur Karla Einarsson**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg haldi ikki, vit kunnu lata illa at við arbeiði higartil í vetur, sigur Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum, Hæddini*

Fyri jól hevði arbeiðarafelagið, Hæddin, trupulleikar við einum arbeiðsgevara, sum hevur 14 limir hjá felagnum í arbeiði.

Karla Einarsson sigur, at málið snúði seg um, at sáttmálin ikki varð yvirhildin til fulnar. Trupulleikar vóru við lønum, eftirløn og lívstrygging hjá limunum.

– Men lønar-og tryggingarviðurskiftini millum arbeiðsgevaran og arbeiðsfólkið eru nú komin uppá pláss, og vit vóna, at arbeiðsgevarin nú fer at halda sínar skyldur, sigur hon.

### Frægari í vetur

Karla heldur ikki, at nógvir limir í arbeiðarafelagnum, Hæddini, eru arbeiðsleysir. Tað hevur felagið ikki varhugan av.

Hon heldur hinvegin, at væl av arbeiði hevur verið higartil í vetur, kanska meira enn onkran vetur frammanundan, tá ið tað viðraði illa, og minni fiskur kom uppá land.

Tað er altíð skiftandi hjá teimum, sum arbeiða á fiskavirkjunum, tí veðurlíkindi, fiskiskapur og eitt nú fiskaprísir hava sína ávirkan á, hvussu nógv kemur uppá land.

– Men eg haldi ikki, vit kunnu lata illa at higartil í vetur, sigur Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum, Hæddini.

# Skattalættin einki verdur

**– Verður hetta skattapolitikkurin hjá nýggju samgonguni, beri eg ótta fyri, at tað verður arbeiðarin, sum noyðist at gjalda fyri lættan hjá teimum høgu inntøkunum við nýggjum inntøkulógum, heldur Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum, Hæddini og stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag**

SKATTALÆTTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í arbeiðarafelagnum, Hæddini, heldur lítið um ætlaða skattalættan hjá nýggju samgonguni millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin.

Karla Einarsson heldur lítið um, at tað verða tær høgu inntøkurnar, sum fáa lættan – og ikki tey, sum skulu liva av eini vanligari arbeiðaraløn.

– Hetta boðar avgjørt ikki frá góðum, heldur hon.

### Verri fyri

Karla Einarsson, sum eisini er stjórnarlimur í FA, heldur lítið um, at lættin, sum ætlandi fellir vanliga arbeiðaranum í lut, ikki røkkur til fýra sigarettpakkar um mánaðin – og neyvan heldur til tvær fløskur av bíligum víni, sum sagt hevur verið.

– Verður hetta úrslitið av skattalættanum hjá nýggju samgonguni, verður hetta als eingin lætti at tosa um. Tað eru ikki okkara limir, sum tjena hálva miljón um árið, leggur hon dent á.

Karla Einarsson ber hinvegin ótta fyri, at verður hetta skattapolitikkurin, verður tað arbeiðarin, sum noyðist at gjalda fyri lættan hjá teimum høgu inntøkunum við nýggjum inntøkulógum.